## ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*»Løgmaður hevur gott samband við fjølmiðlarnar, men hann ræðist teir«*
*Jógvan við Keldu*

# Ísrael bíðar við stórálopi



*Hendir einki munagott í ST teir næstu dagarnar, fer Ísrael at seta sína næstu álopsætlan í verk*
*Mynd: Reuters*

**Diplomatisku royndirnar hjá ST fáa ein møguleika, sigur ísraelska stjórnin. Men ikki meiri enn tríggjar dagar**

Men tað kann taka longri tíð enn so at fáa eina diplomatiska loysn á kreppuni í Libanon. USA og Frakland, sum í fleiri dagar hava arbeitt við einum uppskoti, kunnu ikki semjast um, hvussu skjótt Ísrael skal taka sínar hermenn úr Suðurlibanon, og júst hendan ósemjan er orsøkin til, at einki uppskot er komið enn.

Libanska stjórnin hevur gjørt greitt, at hon vil hava teir ísraelsku hermenninar úr landinum, so skjótt bardagarnir millum ísraelska herin og Hizbollah eru steðgaðir, Samstundis skal libanski herurin taka sær støð á marknaleiðunum.

Frakland tekur undir við sjónarmiðunum hjá libansku stjórnini, men tað ger USA ikki. Amerikanska stjórnin sigur, at hon tekur undir við ísraelska kravinum um, at teir ísraelsku hermenninir skulu verða verandi í Suðurlibanon, til ein altjóða herdeild er komin hagar. Nei, sigur Libanon og vísir á, at tað kann taka fleiri mánaðir at manna eina altjóða friðarherdeild og at flyta hana til Miðeystsurs.

### Álopsætlan klár

Hendir einki munagott í ST teir næstu dagarnar, fer Ísrael at seta sína næstu álopsætlan í verk. Umboð fyri stjórnina og herleiðsluna samtyktu í gjár at senda 30.000 hermenn afturat til Libanon. Eftir samtyktini skal ísraelski herurin taka seg heilt norður til Litani-ánna, sum er einar 20 kilometrar norðan fyri markið millum tey bæði londini, og í samtyktini stendur eisini, at átakið kann taka ein mánað.

Amerikanska stjórnin ávaraði í gjár Ísrael ímóti at herða álopini, tí tey krevja ov mong sivil mannalív. Keldur í Ísrael siga, at Ehud Olmert, forsætisráðharri, var ímóti at víðka átakið í Libanon, men at herleiðslan strongdi á fyri at fáa fleiri hermenn norður um markið. Higartil hevur ísraelski herurin mist 65 hermenn í Suðurlibanon, og sum skilst skal herleiðslan hava sagt, at herurin kann missa millum 300 og 500 hermenn, áðrenn átakið er liðugt.

Samstundis er greitt, at ísraelska stjórnin og herleiðslan eru undir stórum trýsti, tí tað vanliga fólkið í Ísrael krevur, at kríggið gevur úrslit. Enn bendir einki á, at Ísrael hevur verið ført fyri at steðga rakettálopunum hjá Hizbollah, og tað var helst eisini orsøkin til, at ísraelsku hermenninir í Suðurlibanon fingu annan leiðara í gjár. Vælvitandi keldur siga við AP, at generalurin, sum stóð á odda fyri hermonnunum, varð hildin at vera ov seinførur og ov varin.

### Langt talv

Endamálið við tí ætlaða, ísraelska stórálopinum í Suðurlibanon sigst vera at gera Hizbollah so stóran skaða sum gjørligt, áðrenn ein møgulig vápnahvíld noyðir Ísrael at gevast við álopunum.

Men ein tílík vápnahvíld kemur neyvan í bræði, tí tingingarnar kunnu lættliga gerast eitt langt talv. Sum nevnt kunnu USA og Frakland ikki semjast um ísraelsku afturtøkuna, og Russland, sum hevur sýtingarrætt, hevur gjørt púra greitt, at landið fer ikki at góðtaka nakað uppskot, sum libanska stjórnin ikki kann góðtaka.

Ísraelska stjórnin ber ótta fyri, at Hizbollah fer at menna seg aftur, so skjótt teir ísraelsku hermenninir eru farnir suður um markið. Tí kann landið ikki góðtaka eina vápnahvíld, sum ber í sær, at teir ísraelsku hermenninir skulu úr Libanon beinanvegin.

– Skulu vit góðtaka eina diplomatiska loysn, má hon tryggja okkum frið mong á fram í tíðina, segði ísraelski verjumálaráðharrin, Amir Peretz, í gjár.

# Gera Suðurlibanon til ísraelskan kirkjugarð

– Vit fara at noyða ísraelska herin at taka seg úr landi okkara, sigur Hizbollah-leiðarin.

Hóast Ísrael hevur søkt av støðum hjá Hizbollah við granatum, bumbum og rakettum í fleiri vikur, bendir einki á, at felagsskapurin er viknaður stórvegis, og summir eygleiðarar siga, at Ísrael kann heilt einfalt ikki vinna á Hizbollah, sum hevur ein mannsterkan, væl vandan og væl útgjørdan her.

– Vit fara at noyða teir at taka seg aftur. Gera teir ikki tað, fara vit at gera Suðurlibanon til ein kirkjugarð hjá ísraelskum hermonnum, segði leiðarin í Hizbollah, Hassan Nasrallah, í einari sjónvarpsrøðu í gjár.

Hann legði afturat, at Hizbollah tekur undir við ætlanini hjá libansku stjórnini at senda 15.000 hermenn til marknaleiðina, um tað kann hjálpa stjórnini at fáa broytt orðalagið í uppskotinum hjá Fraklandi og USA. Sjálvur heldur Hassan Nasrallah, at USA roynir at noyða tey ísraelsku krøvini ígjøgnum ST-trygdarráð, sama hvat tað kostar Libanon.

– Vit hava góðtikið, at stjórnin sendir herin suður til markið, og tekur alt fólkið undir við tí, fara vit ikki at seta okkum upp ímóti ætlanini, segði Hizbollah-leiðarin og legði afturat, at avgerðin hjá stjórnini kann bjarga Libanon undan einari veruligari vanlukku.